# Nøvn

## Føðingar

8. november fingu Beinta Ellendersen og Teitur Albinus, Hvalba, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3450 gr.

8. november fingu Herborg á Lakjuni Simonsen og Jóhannes Simonsen, Fuglafirði, ein dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4700.

11. november fingu Poula Patursson og Hanus Midjord, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3425 gr.

11. novemer fingu Sólvá og Sam Vang, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3885 gr.

12. november fingu Guðrun Udbø Petersen og Dávur J. Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

13. november fingu Pernille Krogh og Óli Reynskor, Sørvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4000 gr.

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**




## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermóðir, omma og langomma

### Kristina Dahl Oyri

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri hjálpsemi frá tykkum á Mørkini.
Takk til prest fyri góð orð í kirkjuni og takk fyri sang og urguspæl.
Takk til tykkum øll, sum skipaðu so væl fyri ervinum.
Takk fyri heilsanir og gávur til Leguhúsið í Nesvík.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

**Familjunnar vegna**
***Aksel***

## TØKK

Takk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma

### Aspa Nolsøe Kaldbak

andaðist og fór til gravar.

Takk til Hera Joensen prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara. Takk til tykkum, sum stóðu fyri ervinum og til tykkum, sum bakaðu.
Takk til starvsfólkið á Handarustovu fyri tíðina, hon var hjá tykkum.
Takk fyri blómur og kransar og fyri peningagávu til Lágargarð, og takk til tykkum mongu, sum vóru komin at fylgja.

***Ella, Høgni, Ruth***
***Petur, Ruth, Høgni, Hannis og diddan***

## TØKK

Øllum tykkum mongu, sum á ein hvønn hátt sýndu samkenslu, stuðlaðu og hjálptu okkum, tá elskaði maður, pápi, sonur, svigarsonur og beiggi okkara

### Finn Jacobsen úr Vági

brádliga hvarv umborð á Taasinge Maersk.

Takk til familju, vinir og kenningar fyri tykkara ómetaligu umsorgan og hjálp, eisini til minningarhaldið í kirkjuni og løtuna aftaná í Meinigheitshúsinum. Uttan tykkara hjálp og stuðul hevði verið ringt at komið víðari.

Guð vælsigni tykkum øll.

**Familjunnar vegna**
***Sanna, Heini, Barbara, Kári og Kaja***

## TØKK

Eina hjartans tøkk vilja vit veita fyri stóra samkenslu, tá venjari okkara

### Aivaras Daugis

so brádliga varð tikin frá okkum.

Eisini takka vit, familjunnar vegna, fyri tær gávur, sum latnar vórðu og sum blivu sendar víðari til konu og børn.

**Við ítróttarkvøðu**
***Vágs Bóltfelag***

## Takk

Mína hjartans tøkk beri eg tykkum øllum, sum gleddu meg á 90 ára degnum við samveruni í Meinigheitshúsinum og á ymsan annan hátt við heilsanum tykkara. Ikki minst takki eg Meinigheitshúsinum í Havn og teimum, sum stákaðust og gingu fyri borðum.
Gud vælsigni tykkum øll!

**Johs. Andr. Næs**



## TØKK

Vit vilja hjartaliga takka fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður mín, sonur, beiggi, pápi og abbi okkara

### Eirikur Rasmussen

doyði og varð jarðaður.

Takk til palliativa toymið á B6 fyri hjálp og umsorgan.
Takk til øll tykkum, sum gjørdu tað møguligt at útinna seinasta viljan hjá Eiriki. Til Lenu, Niclas og Birgar, Kim Hansen og dupultkvartettina í Ebenezer fyri hjartanemandi sang.
Takk til Poul Michelsen fyri stórfingna hjálp.
Takk til HB fyri lán av húsinum.
Takk til tykkum, sum bakaðu, hugdu inn á gólvið, ringdu og á annan hátt mintust okkum.
Takk til øll, sum sendu blómur, kransar og peningagávur til Krabbameinsfelagið.
Takk til Berg prest fyri ógloymandi og troystandi orð.
Takk til berarar.
Takk til øll, sum fylgdu Eiriki til hansara seinasta hvíldarstað.

**Vegna familjuna**
***Guðbjørg***